Lívdin
- í lívd hins hægsta

Juli – august 2009



# Summarsteðgur



Mynd: Einar Vang

Eins og undanfarin ár verður summarsteðgur í Lívdini í summar. Eingi møtir verða í Hoyvíkar skúla sunnudagarnar 19. og 26. juli og 2. august. Møtini á Brekku týskvøld byrja aftur 18. august.

Myndin er tikin sunnudagin 28. juni, tá borðini við kaffi og køkum vórðu flutt út í tún. Meðan vit hugnaðu okkum uttanfyri, varð gudstænastan liðug í Hoyvíkar kirkju, og fólk komu yvir at práta. Tá kom onkur við tí hugskoti at skipa fyri eini felags hugnaløtu á økinum millum skúlan og kirkjuna fyri Hoyvíkar kirkju, Oasuna og Lívdina onkran góðveðursdag. Vit lata hugskotið fara víðari.



## Góða summarferiu



Summarfrí! Hetta er tíðin á árinum tá vit fara burtur at njóta heitari lond og góðar umstøður at hvíla okkum. Jesus visti, hvussu stóran týdning hvíld hevur! Í Markus 6:30 lesa vit: “Tá segði Hann við teir: „Komið nú við Mær burtur til oyðið stað, har vit fáa verið einsamallir, *og hvílið tykkum eitt sindur!*“ Jesus hevði havt ein stravnan dag hendan dagin! Hann hevði givið 5000 monnum at eta – umframt kvinnum og børnum. Hann sigur tí við lærisveinar Sínar: ”Hey, latið okkum fara at slappa av.” Ein av grundunum til, at Jesus kláraði nógv trýst í lívi Sínum, var, at Hann dugdi at slappa av. Hann visti, nær Hann kundi sleppa arbeiðinum og hvíla. Hann fór regluliga út í fjøllini ella oyðimørkina at hvíla og brúka tíð saman við Faðir Sínum.

Hvíld (svøvnur og frítíð) og endurnýggjan (likamlig venjing og rættur kostur) er ikki eitt val – tað er alneyðugt! Gud veit, at vit hava likamligar, kensluligar, mentalar og andaligar tørvir – og at øllum hesum økjum tørvar endurnýggjan. Eg ynski tykkum tí eitt signað summar og vóni, at tit veruliga kunnu hvíla og fylla battaríini, til vit byrja aftur í august.

*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

### Til Skotlands at halda føðingardag

Mánadagin 29. juni fór Karita Maria Zachariassen, saman við foreldrum sínum Unn og Jógvan, til Skotlands at halda sín 10 ára føðingardag, sum var mikudagin 1. juli.



*Karita Maria við "Royalmyntinum"*

Karita Maria varð fødd í Skotlandi tann 1. juli 1999 - sama dag sum Skotland fekk sítt fyrsta parlament í mong hundrað ár. Øll børnini, sum vórðu fødd tann dagin, fingu ein "Royalmynt" frá Queen Elizabeth.

Í hesum sambandi vórðu øll børnini, sum vórðu fødd í Skotlandi hendan dagin - uml. 160 í tali - boðin til eina serliga føðingardagsveitslu, sum var fyrireikað til teirra.

### Rannvá við Logos Hope

Rannvá Djurholm fer við Logos Hope í summar. Hon fór av landinum 1. juli og kemur aftur til Føroyar 16. august. Túrurin byrjar í Norðurírlandi í Cork. Síðani siglir skipið til Karibiska havið til Grenadines og Grenada.



*Rannvá Djurholm*

### Gunnvá til Ukraina og USA

27. juni fór Gunnvá í Liða avstað til Ukraina, har hon skal hjálpa til á barnalegum fyri barnaheimsbørn. Hetta er ein toymisferð hjá Heimamissiónini, sum verður gjørd í samstarvi við Youth With A Mission. Aftur komin til Danmarkar fer hon til Oregon í USA í tríggjar mánaðir at vitja vinir frá tíðini, hon var skiftisnæmingur har.



*Gunnvá í Liða*

### Paradís á jørð í Ukraina

Í brævi til samkomur og einstaklingar heitir Skandinaviska Barnamissiónin á okkum í Føroyum um at stuðla teimum yvir túsund børnunum, sum tey hjálpa á summarlegunum í Ukraina. Hesar legur eru sum eitt paradis á jørð fyri hesi børn, sum annars ikki hava tað so gott, skrivar Bo Wallenberg, missiónsstjóri.

Adressan er: Skandinaviska Barnamissiónin v/ Ellu Niclasen, Reynagøta 19, FO-100 Tórshavn. Postgironummar: 71757.



*Bo Wallenberg talar í Lívdini*

## Gávukekk til Tilhaldið

Tá Várfestin var í miðbýnum í Havn sunnudagin 17. mai varð m.a. skipað fyri uppboðssølu av málningum hjá fleiri føroyskum listafólkum. Fyrireikararnir avráddu, at avlopið av Várfestini skuldi fara til Tilhaldið í Tórsgøtu, og týsdagin 16. juni fingu tey ein gávukekk upp á 47.800 krónur frá teimum, sum skipaðu fyri tiltakinum.




*Wanja Petersen, leiðari á Tilhaldinum, við gávukekkinum*

## Tillukku við próvnum

Fríggjadagin 19. juni fingu læraraskúlanæmingar prógv á Føroya Læraraskúla. Teirra millum vóru Rachel Eysturtún og Rani A. Skaalum.



*Rachel Eysturtún*



*Rani A. Skaalum*

## Sangir og bíbliutímar á fløgu

Heðin Sørensen frá H.S. Studio í Hoyvík hevur tikið upp sjey fløgur við bíbliutímum, sum Zacharias Zachariassen hevur hildið í Filadelfia í Gøtu. Umframt bíbliutímarnar er eisini nógvur sangur á fløgunum, bæði felagssangur, kór o.a. Evnini á bíbliutímunum eru hesi: »Samkoma Guds og tænasta okkara« (fløga 1), »Einleiki Andans í bandi friðarins« (fløga 2), »Heilaga Andans dópur og fylling« (fløga 3), »Ójavnt ok« (fløga 4), »Dópurin« (fløga 5), »Tann stilla løtan« (fløga 6) og »Einglar« (fløga 7). Tey, sum hava áhuga fyri hesum fløgum, kunnu venda sær til:

H.S. Studio
v/ Heðin S. Sørensen
Maritugøta 48
Hoyvík
tel. 52 1169



*Heðin Sørensen í upptøkurúminum hjá H.S. Studio í Hoyvík*

## Tillukku við barninum

28. januar 2009 fingu Nancy Hejnesen og Egil Midjord í Havn eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3.300 gr. Hon eitur Ronja Marin Midjord.

## Tillukku við hjúnabandinum

Fríggjadagin 12. juli giftust í Listaskálanum Halldóra Krett og Oddur Johansen.



# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

**Undirvísing og bøn týskvøld kl. 20.**

7. juli til 11. august:
(summarsteðgur – eingi møtir)



## Felags ungdómsmøtir

Fríggjakvøldið 26. juni var seinasta ungdóms-møti áðrenn summarsteðgin. Í juli verða felags ungdómsmøtir í Ebenezer hvørt leygarkvøld kl. 20.00 saman við ungdóminum í Ebenezer og Hebron á Argjum.

Heimasíðan hjá ungdóminum í Lívdini er www.ung.livdin.fo



# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

## Sunnudagin 5. juli

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Frásøgn frá túrinum í Rumenia*
*Talari: Anna Maria Anthoniussen*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Opið evni*
*Talari: Gunnar Nielsen*
** Innsavning til nýggja bygningin*



Anna Maria



Gunnar

## Sunnudagin 12. juli

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Yndissangir*
Talarar: Vitjandi

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Hugleiðing um minnismáltíðina og heilsan áðrenn summarsteðgin*
*Talarar: Jákup Jacobsen og Jens Wang*



Jákup



Jens

## Sunnudagarnar 19. juli, 26. juli og 2. august

(summarfrí - einki møti)

## Sunnudagin 9. august

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Pætur út á vatnið gekk*
*Talari: Absalon Áargarð*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Nýggj byrjan*
*Talarar: Ruth og Valdemar Lützen*
** Lívdin sendir Ruth og Valdemar Lützen út sum trúboðarar*



Absalon



Valdemar



Ruth

## Sunnudagin 16. august

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Yndissangir/vitnisburðir*
*Talarar: Ymisk*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Endamál og visiónir*
*Talarar: Johan Syderbø og Jógvan Zachariassen*



Johan

## Sunnudagarnar 23. og 30. august

(sí heimasíðuna)



Jógvan

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*